# Nøvn

## Føðingar

17. mai fingu Harriet og Bárður Lydersen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 48 cm long og vigaði 2550 gr.

1. juni fingu Jona Lamain og Jákup í Horni, Hørsholm, eina dóttur. Hon var 48 cm long og vigaði 3160 gr.

2. juni fingu Akiko og Ragnar Waagstein, Japan, ein son. Hann vigaði 3720 gr. og var 52 cm langur.

5. juni fingu Eyð Traber og Magni Olsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3480 gr.

6. juni fingu Judith Reinert Petersen og Samuel Peter Petersen, Kambsdali, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3800 gr.

6. juni fingu Durita Andreassen og Andrias Hansen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3650 gr.

7. juni fingu Joan Poulsen og Jóhan Petur Johannesen, Funningi, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3620 gr.

7. juni fingu Kristina Atnadóttir og Tórður Johannesarson, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3275 gr.

### Fyri 5 árum síðan:

## Brian Kerr vann á Føroyum

Mikukvøldið 8. juni 2005 spældu Føroyar og Írland HM-undankappingardyst á Tórsvølli.

Umleið 5.000 fólk vóru til dystin, sum endaði við, at Írland vann við tveimum málum.

Landsliðsvenjari hjá Føroyum var Henrik Larsen, og venjarin hjá Írlandi var Brian Kerr, sum í dag er venjari hjá føroyska landsliðnum.

Brian Kerr segði eftir dystin, at hann var vælnøgdur við at fara heim aftur til Írlands við trimum stigum, tí øll lið hava trupult við at vinna á føroyingum í Føroyum.

*Kelda: Sosialurin 10. juni 2005*



## Eina framtíð sum sjúkrarøktarfrøðingur

**Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar**

Nú er skjótt síðsta freist, at søkja um upptøku á Sjúkrarøktarfrøðisskúla Føroya. Í mun til undanfarin ár, har lesandi vórðu upptikin í februar, er tann broyting, at lesturin byrja í septembur.

Sjúkrarøktarfrøðisútbúgving er á bachelor støðið og eftir loknað útbúgving eru endaleysir arbeiðs- og lestrar møguleikar kring heimin.

Tey, sum hava áhuga í hesi útbúgving, mugu skunda sær, tí freistin at søkja um upptøku er 14. juni!

Meira um útbúgvingina er at finna á heimasíðuni setur. fo

## Norðurlendskur epilepsifundur

Epileptikarafelag Føroya er vertur fyri norðurlendskum epilepsifundi komandi vikuskifti 11. – 13. juni.

Í sambandi við norðurlendska fundin kemur Absalon Eysturoy, lækni, at tosa um gengransking í epilepsi í Føroyum. Eisini fer Bjarki á Rógvi Hansen at tosa um SUDEP fyribrigdið, ið merkir brádligi deyði hjá teimum, ið hava epilepsi. Hesi innlegg eru ikki almenn, men verða viðgjørd á tí norðurlendska fundinum.

Nevndarforkvinnan Randfríð Sørensen sigur, at uttan stuðul frá stovnum og fyritøkum, hevði hesin norðurlendski fundurin slett ikki kunnað verið hildin í Føroyum, og eru tey sera fegin um tann stuðul, tey hava fingið til hetta tiltakið.

Í sambandi við, at Bjarki á Rógvi Hansen, neurologur er í Føroyum, verður ein fyrilestur í Miðlahúsinum, mánakvøldið 14. juni Kl. 19.30, har Bjarki kemur at tosa um kognitivt órógv hjá fólki við epilepsi. Hesin fundur er almennur, og øll eru vælkomin.

---

†

ANDLÁT

Okkara elskaði pápi, abbi og langabbi

**Jógvan Davidsen, Elduvík**

andaðist hósdagin 100 ára gamal.

Farið verður frá Eysturoyar røktar- og ellisheimi leygardagin kl. 18.00.

Jarðarferðin verður sunnudagin kl 14.00 úr Elduvíkar kirkju.

***Familjurnar vegna***

***Diana, Stig og Hjørdis***

Tey, ið vilja minnast Jógvan við blómum ella kransi kunnu í staðin lata Eysturoyar røktar- og ellisheimi eina peningagávu.

---

TØKK

Hjartans tøkk fyri sýnda umsorgan og samkenslu, tá ið okkara kæri bróðir, svágur, gubbi og abbabeiggi

**Rodmund Nysted Joensen**

andaðist og varð jarðaður.

Eisini ein tøkk til starvsfólkið á G1 intensiv, ið vóru um hann.

Tøkk til Ingu Dam fyri góð og troystarrík orð í kapellinum og vakra talu í kirkjuni.

Tøkk fyri blómur og kransar.

Tøkk til øll, sum á ymsan hátt hjálptu til við ervinum.

Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu honum til hansara síðsta hvíldarstað.

***Familjunar vegna***

***Esbern, Jónvør, Berit, Allan og Joan***

---

TØKK

Hjartans takka vit øllum, ið á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpti til, tá kæra móðir, vermóðir og omma okkara

**Tóra Spangenfeldt**

andaðist og varð jarðað.

Tøkk fyri kransar og blómur og tøkk til tykkum, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

***Finn og Jógvan við familju***